## Betri eftirlit við bretum

Myndugleikarnir í Bretlandi kanna nú møguleikarnar fyri at lata ómannað flogfør hava eftirlit við landsins borgarum. Millum annað verður sagt, at flogførini kunnu hjálpa myndugleikunum í sambandi við mótmælisgongur, ferðslutrupulleikar og stuldur. Bretska verksmiðjan BAE Systems ger ómannað flogfør til hernaðarlig endamál, og sum amerikanarar brúka í Afghanistan og Pakistan. Men skjøl, sum blaðið The Guardian hevur fingið innlit í, vísa, at verksmiðjan arbeiðir við at menna flogfør til sivila nýtslu, og at ætlanin er at brúka tey, tá teir olympisku leikirnir verða í London í 2012.



## Leggur norðmenn undir hykl

Norðmenn hugsa bara um egin áhugamál, tá tað ræður um at gagnnýta stovnarnar av makreli og rossamakreli. Tað sigur formaðurin í uppisjóvarvinnufelagnum í Hirtshals, Christian Olesen, við Intra-Fish. Hann vísir millum annað á, at norðmenn eru í øðini um, at íslendingar hava tillutað sær sjálvum makrelkvotu uttan samtykki frá hinum londunum. Christian Olesen sigur, at norðmenn brúka júst somu mannagongd, tá tað snýr seg um rossamakrelin. Hann sigur, at roosamakrelveiðan hjá ES-skipum hevur verið avmarkað í mong ár, men at ongar avmarkingar eru í Noregi.

# Ný Foundland verður harðast rakt av stongsli



*Arctic Viking, sum her liggur nýmálaður við vestaru bryggju í Havn, roynir í løtu í altjóða sjógvi á Grand Bank, og har fer skipið at gera hendan túrin lidnan. Havborg er í Eysturgrønlandi, og Fríborg er á veg av Flemmis Kap til Eysturgrønlands*

**- Tað hevur sín týdning fyri rækjuskipini, at tey hava møguleikan at leggja inn í kanadiskar havnir, men tey, sum missa mest við stongslinum, er lokala økið í Ný Foundlandi, sum letur skipunum veitingar, lossarar og gloymslurnar. Virksemið, sum føroysku rækjuskipini hava skapt í Ný Foundlandi, hevur ikki havt ongan týdning fyri økið, sigur formaðurin í Felagnum Rækjuskip**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kanada hóttir nú aftur við at steingja sínar havnir fyri føroyskum fiskiskipum.

Í fráboðan siga myndugleikarnir í Kanada, at havnirnar verða stongdar frá 15. februar í ár at rokna, um føroyingar ikki vilja ganga undir avtaluna, sum londini í NAFO hava gjørt um býtið av rækjukvotunum í altjóða sjógvi á Grand Bank, øki 3L, sum tað verður rópt.

Tað er Danmark, sum umboðar Føroyar og Grønland í NAFO, men danir hava tikið støðu føroyinga og grønlendinga til eftirtektar.

### Loyvd ósemja

Føroyar vilja ikki góðtaka býtið, ið NAFO-londini hava gjørt, sum tillutar Føroyum umleið 300 tons av rækjum á hesum leiðum.

Reglurnar í NAFO eru, at limalond kunnu mótmæla avgerðum, sum felagsskapurin kemur til, og tað er soleiðis ikki ólógligt – um vit so kunnu siga – at vera ósamdir um tilmæltu kvoturnar í altjóða sjógvi á Grand Bank.

Tá Føroyar aftur í ár hava tillutað sær eina kvotu upp á góð 3.000 tons, fer Kanada eftir øllum at døma at steingja sínar havnir fyri føroyskum fiskiskipum.

Sum skilst, fevnir stongsulin ikki bara um føroysk fiskiskip, men eisini um grønlendsk fiskiskip, tí hvørki Føroyar ella Grønland vilja góðtaka nevnda býtið.

Jóhan Joensen, formaður í Felagnum Rækjuskip, sigur, at av teimum stívliga 3.000 tonsunum, sum Føroyar hava tillutað sær, kunnu grønlendsk rækjuskip fiska tey 480 tonsini, soleiðis at føroyski parturin, sum eftir er, verður 2570 tons.

- Avgerðin hjá føroyskum myndugleikum er í samráð við teir, sum eiga rækjuskipini og soleiðis eisini í samráð við Felagið Rækjuskip, sigur hann og leggur aftrat, at tá veljast skal ímillum kvotur og havnir á hesum leiðum, fellir valið heilt avgjørt á kvoturnar.

Formaðurin vísir á, at sjálvandi hevur tað ein ávísan týdning, at skipini kunnu sleppa inn í kanadiskar havnir, men tá valið stendur millum kvotur og havnir, er eingin ivi.

Vanliga hava føroysku rækjuskipini verið inni í Bay Roberts í Ný Foundlandi, har tey hava lagt veiðina upp og hava keypt veitingar.

- Tey, sum missa mest við stongslinum, er lokala vinnan í Ný Foundlandi - tey, sum lata skipunum veitingar, lossarar og gloymslurnar. Virksemið, sum føroysku rækjuskipini hava skapt í hesum øki, hevur ikki havt ongan týdning fyri lokala økið.

Spurdur, hvat stongsulin merkir fyri Grønland, sigur Jóhan Joensen, at her hevur hann lítlan og ongan týdning.

- Kvotan hjá Grønlandi er ein túrur hjá einum rækjuskipi, og tá túrur er lokin, siglir skipið kortini av leiðini, leggur hann aftrat.

### Søgulig rættindi

- Orsøkin til, at Føroyar ikki vilja góðtaka býtið av rækjukvotunum í altjóða sjógvi á Grand Bank er, at vit meta okkum eiga størri søgulig rættindini á hesum leiðum, enn nevnda býtið gevur okkum.

Jóhan Joensen vísir á, at føroyingar vóru teir fyrstu, sum fóru at fiska rækjur á hesari leið tíðliga í nítiárunum, og tí meta føroyskir rækjumenn seg eiga størri rættindi, enn NAFO vil lata okkum.

- Hinvegin hava okkara myndugleikarnir valt at regulera kvotuna á Grand Bank, øki 3L, eftir TAC-num í økinum, leggur hann aftrat.

Rækjurnar á Grand Bank eru góðar, bæði í støðd og dygd, og vit kunnu soleiðis siga, at tær eru næst bestar eftir stóru og góðu rækjurnar í Eysturgrønlandi.

Kanada hevur áður stongt sínar havnir fyri føroyskum fiskiskipum. Hin 1. mars í ár eru tvey ár, síðan landið læt havnirnar uppaftur, og nú bendir so alt á, at nýggjur stongsul verður frá 15. februar 2010 at rokna.

Stongsulin fevnir tó ikki um neyðhjálp.

# Einir 60 føroyingar hava hýru í rækjuvinnuni



RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Trý skip eru eftir í føroyska rækjuskipaflotanum. Tey eru kollfjarðartrolarin, Arctic Viking og leirvíkstrolararnir, Havborg og Fríborg.

Umborð á hesum trimum skipum eru umleið 60 føroyskir rækjumenn.

Sambært tølum hjá Føroya Fiskimannafelag fyri árið í fjør, lá daglønin umborð á hesum trimum skipum úr 1.766 krónum upp í 2.241 krónur, og manningarparturin lá millum 386.000 og 472.000 krónur.

Við frítíðarløn og dagstudningi lá ein miðal hýra umborð á føroyskum rækjuskipi í fjør á 489.000 krónum.

Jóhan Joensen, formaður í Felagnum Rækjuskip, sigur, at raksturin hjá rækjuskipum framvegis er tungur.

- Hinvegin kunnu vit staðfesta, at prísirnir á rækjum ikki vóru fyri eins stórum falli, sum prísirnir á øðrum fiskasløgum vóru, tá altjóða kreppan tók seg upp.

Hann vísir á, at rækjuprísirnir hava líka sum stabiliserað seg aftur, men sum hann tekur til, kundu rækjumenn sjálvsagt ynskt sær, at prísirnir vóru komnir enn longur upp.

- Raksturin er framvegis tungur, og ilt er at spáa um útlitini. Vit vóna tó, at rækjuvinnan, sum árini ganga, aftur fer at gerast ein betri lønandi vinna, sigur Jóhan Joensen, formaður í Felagnum Rækjuskip.

Vit kunnu leggja aftrat, at føroyski rækjuflotin er nógv tóðnaður í einum 10-15 ára skeiði.